


# Gongur framá

**FÓTBÓLTUR** Tað gongur støðugt framá við verkætlanini at byggja nýggjan fótbóltsvøll á Tvøroyri. Tað verður skjótt farið undir samráðingarnar við fyritøkur at kanna tilboðini og annað nærri

Uni Holm Johannesen

Arbeiðsbólkurin boðar frá á sínari heimasíðu, at samráðingar hava verið við tvær fyritøkur at veita grasliki til vøllin.

Tvey tilboð eru um gott og nýmótans graslíki.

Fyrsta og mest grundleggjandi fyritreytin at byggja vøllin er byggiloyvi frá lokala myndugleikanum, Tvøroyrar Kommunu, og tað er framvegis ikki komið í hús.

### Tosað um fígging

Arbeiðsbólkurin vónar at fáa stuðul á fýra milliónir krónur.

Arbeiðsbólkurin hevur tosað við fleiri fíggjarstovnar í Føroyum um at fáa fígging til verkætlanina. Talan er um stuðul frá privatum persónum, vinnuligum fyritøkum, Fótbóltssambandinum, grunnum og øðrum.

Tað verður hinvegin mett, at stuðul frá privatum persónum fer at hava størst týdning, og tað verður somuleiðis sett størst spurnartekin við hesa loysnina.

– Ætlanin er eisini, at ein stuðul verður høvuðsstuðul og somuleiðis navnastuðul. Tað er stuðulin, sum stuðlar við størstu upphæddini, og soleiðis keypir sær rættindini at navngeva vøllin næstu fimm til 10 árini, skrivar bólkurin á sínari heimasíðu.

Byggingin av einum skýli, sum skal byggjast fyrr ella seinni, verður bygt, tá fíggjarliga orkan røkkur til tað.

### Nær ítróttarhøllina

Ætlanin er at leggja vøllin nær ítróttarhøllina í Trongisvági.

Fyrimunirnir eru, at økið er vælhóskandi. Tað er eisini møguliga at gagnnýta møguleikarnar í ítróttarhøllini, sum hevur skiftirúm. Tað ger verkætlanina bíligari, um hús ikki skal byggjast til skiftirúm.

Tað kunnu tvøráfólk hugsa um seinni, verður sagt.

*uni@sosialurin.fo*

# The Telegraph rósar Páli

**SVIMJING** Rod Gilmour tekur á heimasíðuni hjá bretska The Telegraph saman um svimjiárið 2010. Hann heldur, at Pál Joensen vann flottasta silvurheiðursmerki í fjør

Uni Holm Johannesen

»Runner-up of the year« er heiðurin, sum Rod Gilmour gevur vágbinginum.

Hann skrivar, at Føroyar vinna sjáldan í altjóða kappingum, og ítróttarárið 2010 var lítið øðrvísi.

Men silvurheiðursmerkið, sum Pál Joensen svam til Føroya, undir EM var eitt ótrúligt avrik, heldur Gilmour.

– But one Faroe came agonisingly close to pulling off one of the sport's great shocks in the 1500m at the Europeans, skrivar hann og vísir á, at Pál Joensen venur dagliga í einum 25 metra svimjihyli.

*uni@sosialurin.fo*




# Stjørnan fekk lættastu uppgávuna



*Savnsmynd*

**HONDBÓLTUR** Stjørnan skal spæla móti næstbesta liðnum hjá StÍF hjá kvinnum, og Neistin og VÍF bresta saman hjá monnum

Uni Holm Johannesen

Stjørnan er greiður favorittur at vinna seg í steypafinaluna hjá kvinnum. Greipuvinnararnir úr Klaksvík spæla móti næstbesta liðnum hjá StÍF í hálvfinaluni. Stjørnan hevur tí lættastu uppgávuna á pappírinum at spæla seg í steypafinaluna.

Hondbóltssambandið hevur drigið lut um, hvørji lið hittast í hálvfinaluni í steypakappingini hjá kvinnum og monnum.

Neistin og Tjaldur spæla í hinari hálvfinaluni hjá kvinnum.

Hjá monnum hittast Neistin og VÍF, og KÍF og StÍF.

*uni@sosialurin.fo*

**1/2 FINALUR**

## Kvinnur:

*11. januar 2011 :*

Neistin – Tjaldur

StÍF I – Stjørnan

*2. februar 2011:*

Tjaldur – Neistin

Stjørnan – StÍF I

**1/2 FINALUR**

## Menn:

*11. januar 2011:*

Neistin – VÍF

KÍF – StÍF

*1. februar 2011:*

VÍF - Neistin

StÍF - KÍF